Filmur

The serial Killer as a Young Man:

# - Søgan um Hannibal Lecter

## Ummæli



**Kim Simonsen**
kimsimonsen@hotmail.com



**Ungi Hannibal Lecter er faðirloysingur. Bæði foreldrini doyðu undir seinna heimsbardaga. Hann er einsamallur við systrini Mischa. Seinni taka hermenn smágentuna Mischu av døgum**

Hannibal bjargar lívinum og flýddi sjálvur undan leiguhermonnum. Hann endaði á einum barnaheimi, men rýmur haðani til Paris og fer at búgva hjá konuni hjá pápabeiggjanum Lady Murasaki. Hon tekur sær av honum og lærir hann um fínmentan. Hannibal fær stóran áhuga fyri vápnum, heilivági, matgerð og mannakjøti. Jú hesin mentaði drápsmaðurin og psykopaturin er komin aftur, men orka vit at hoyra um Hannibal aftur?

Vit sóu hetta tema í filminum The Perfume herfyri og í søgunum um Hannibal fyrr.

Skaldsøgurnar til filmin The Silence of the Lambs, ið vann seks Oscars í 1991, eru skrivaðar av Thomas Harris. Seinni kom so Hannibal í 1999.

Hannibal sum ungt menniskja, ella eitt Portrait of The Serial killer as a Young Angry Man. Hesin ungi maðurin er ein sera óður og óndur maður, klókur og vandamikil. Hann fer at leita eftir teimum, sum hava dripið systrina, og hann kann ikki støðgast.

Kant tosar um hypotetiska imperativið, at ein gerningur uttan annan moral enn bert at fylgja eini reglu er vandamikil. Ein lækni kann t. d. grøða, og hann kann drepa, hetta er bert ein spurningur um dosering. Hannibal, sum lesur læknafrøði, skilir bert hetta seinasta.

Filmurin er myrkur og heldur langdrigin. Persónliga eri eg ikki til ræðufilmar, men eg dugi at síggja, at hann er meiri enn ein drápsfilmur. Hannibal Rising er væl gjørdur og hugtakandi, men søgan ella mytan um Hannibal er eitt sindur útvatnað.

Tey sum elska heetta filmsslagið, skulu sjálvandi í Havnar Bio at lata seg skelka av Hannibal einaferð enn.

### Fakta um Hannibal Rising

**Leikandi**:

| | |
|---|---|
| Hannibal: | Gaspard Ulliel |
| Lady Murasaki: | Gong Li |
| Grutas: | Rhys Ifans |
| Kolnas: | Kevin McKidd |

Leikstjóri Peter Webber. 117 minuttir. Framførdur í Havnar Bio frá fríggjadegnum 9. mars. Aldursmark 15 ár.

# Svarta madonnain

**Filmurin Den sorte Madonna er ein donsk kærleikskomedia. Stuntmaðurin Lasse Spang Olsen hevur leikstjórnað filminum. Hann hevur áður givið okkum filmar sum Gamle mænd i nye biler, Inkasso og ikki minst kultfilmin I Kina spiser de hunde**

Filmurin snýr seg um ungu kvinnuna Mariu, ið lesur á Handilsháskúlanum og er strippari um kvøldið. Pápi hennara Kurt (Morten Grunwald), er ein, sum øll løgreglufólk kenna. Nú er hann gamal og vil gera sítt seinasta innbrot. Hann stjelur ein kendan málning, eina russiska ikon, kallað Svarta Madonnain, saman við Victor og Brian (Ole Thestrup og Nicolas Bro). Ætlanin er at selja myndina til eina russiska mafiakontakt.

Filmurin er eisini um løgreglumannin Gustav (Anders W. Berthelsen), sum leitar eftir Kurt, ið hevur sent dóttrini kenda málningin. Hon verður nú noydd at velja, um hon sigur løgregluni frá um myndina og fáa eina finningarløn upp á fleiri milliónir, men so kemur pápin illa fyri av russiska listahandlaranum, ella at hjálpa pápanum. Birthe Neumann er her ein millumforhandlari, ið hevur fangað Kurt. Maria velur pápan og fer eina ferð til Russlands. Sjálvandi fer Gustav við, og tey gerast góð.

Filmurin er ein klassisk kærleikskomedia. Tað sum á ein hátt bjargar filminum frá tí banala, eru nógvu góðu hjáleikarnir so sum Ole Thestrup, Nicolas Bro og Birthe Neumann, ið øll spæla meiri ella minni nakrir deiligir psykopatar.

**Dreingjareyvaleikstjórin**

Anders W. Berthelsen er fínur í leiklutinum sum Gustav.

Lasse Sprang Olsen blandar altíð humor, spenning og romantik í sínum filmum. Ikki minst er hann kendur sum stuntmaður og fyri at duga væl at fara við special effects. Eykennið er hart Tarantinokent aktion blandað við ógvusligum skemti. Ofta er hetta sera undirhaldandi, men nú er hann farin meiri yvir í kærleikskomediuna, og her er hann ikki so sterkur. Filmurin punkterar nærum ávegis og gerst kroystur.



★★★☆☆☆

### Fakta um Svørtu Madonnaina

**Leikandi**:
Mille Dinesen
Anders W. Berthelsen
Søren Pilmark

Leikstjóri: Lasse Sprang Olsen. Frumframførdur 9. mars í Havnar Bio. 90 minuttir. Aldursmark 11 ár.

## DVD-ummæli

**Ice Age 2** er um mammut elefantin Manse, dovindjórið Sid, sapultikarin Diego og æviga óheldiga og raska lítla djórið Scrat, ið er sjúkliga stuttliga besettur av at savna akarn. Tað besta er enn einaferð Scrat og hansara sinnsjúkt stuttliga og altíð neurotiska og fanatiska leitan eftir akarn, ið altíð enda við at skapa stórar náttúruvanlukkur. Tað er originalt at gera ein teknifilm um ístíðina, og sera læruríkt fyri børnini. Her er okkurt av gandinum, sum er í modernaðum ævintýrum



4 stjørnur av 6.
Ice Age: The Meltdown
Leikstjórn Carlos Saldanha.
90 minuttir.

Danir gjørdu onkran góðan ungdómsfilm í sjeytiárunum. Serliga hendan **Vil du se min smukke navle** hjá Søren Kragh-Jacobsen er ein klassiskari frá 1978, ið nú er komin á DVD. Hann er um, hvussu ringt tað er at vera í pubertetinum og forelskaður. Tey 16 áragomlu eru á legu í Svøríki. Ein lítil filmperla um at verða forelskaður, ungur og ein filmur um eydnu, kærleika, sorg og øvund. DVD-útgávan er einki serligt tó.
5 stjørnur av 6



**An Inconvenient Truth**
Al Gore og veðurlagsbroytingarnar. Filmurin er ein roynd at seta fram granskingina innan økið. Al Gore er alvápnaður við fakta um veðurlagsbroytingarnar sum tema og ikki minst myturnar um, at hesar broytingar ikki eru manaelvdar. Samanumtikið er hetta ein sera skelkandi filmur, og DVD-útgávan er góð við nógvum góðum eykatilfari.
5 stjørnur av 6.

